

*Nógvir leidningar og annað skal fáast upp á pláss. Her er Heidi avmyndað við tveimum dønum, ið eru komnir til Føroya at arbeiða*

*Framhald av síðu 3*

aðrastaðni, men har skal ein eisini duga at tulka og tillaga íblásturin. At vera søkjandi og royna at finna bestu loysnina hevur nógv at siga.

– Men sjálvt um tú ert liðug at tekna, so merkir tað ikki, at tú bara skalt setast hendur í favn. Ein skal allatíðina vera opin fyri broytingum. Hetta er fyrstu ferð, eg eri við í allari gongdini frá tí, at verkið bert var ein tanki og til tað nú verður ført út í lívið, og endin er nær, sigur Heidi.

Víðari greiðir Heidi frá, at samskiftið við handverkararnar hevur ótrúliga nógv at siga. Teir kunnu vísa á eitt ella annað, ið kann verða gjørt øðrvísi, og harvið eisini betur. Og at ganga á byggiplássinum kann geva ógvuliga nógv, tí sjálv hevur hon onga tekniska bakgrund.

– Við tað, at eg ikki eri timburmaður, og tískil heldur ikki havi nakra tekniska bakgrund, havi eg nógv at læra hóast eg eri útbúgvin arkitektur. Tað týdningarmesta er helst, at tú hóast alt, hevur lært teg at skilja ímillum tað góða og minni góða handverkið, og tí veit, hvar tú skalt leita tær góð ráð.

### Úrslit

Tað er ógvuliga spennandi at síggja tilgongdina av tínum arbeiði, heldur Heidi. Men hvussu er tað so at síggja eitt konkret úrslit.

– Úrslitið er ógvuliga kensluborið. Tú hevur lagt nógvar kenslur í tað tú gert. Ein kann siga, at tað er sum eitt barn. Føðingin er hørð, men tá barnið so er komið í verðina, so er gleðin stór.

Áðrenn Heidi kom til Føroya arbeiddi hon á eini teknistovu í Danmark. Tá sat hon mest og skitseraði, og síðani varð tað, hon hevði teknað sent víðari til ein saksarkitekt, sum so fullførdi uppgávuna. Her er talan um íbúðarbyggingar, sølumiðstøðir, skrivustovuinnrættingar og annað. Størstu uppgávuna metir Heidi verða, tá hon teknaði eina sølumiðstøð í Herlev. Men størsta avbjóðingin hevur heilt vist verið tinghúsið, sigur hon.

– Ein og hvør uppgáva er ein heilt serliga avbjóðing. Um hon er lítil ella stór er líkamikið, og allar verða loystar yvir sama leist við skitsering, projektering og bygging. Hvørja ferð tú skalt gera okkurt, er tað sum at byrja heilt av nýggjum. Tú byrjar við skitseringsrunduni, har tú analyserar, hugsar og skitserar. Síðani verður hetta til ein konkretan bygning, har tú síðani viðger tilfarið, fortelur Heidi Poulsen.

Heidi leggur dent á, at tað er týdningarmikið, at tú ikki gongur og billar tær inn, at tú dugir alt. Ein skal vera opin fyri ráðum og lurta eftir fólki, ið vita betur enn tú.

– Ógvuliga umráðandi er at vera tilvitað um, hvar í verðini vit eru stødd, og hvørji tíð vit liva í. Byggilistin skal helst avspegla ta tíð, hon er vorðin til í, soleiðis at hon, eins og onnur list, er eitt úrslit av, at menniskjað hevur sansað, tulkað og tikið støðu.

### Fyrr og nú

Fyrstu føroyingarnir, ið hava búsett seg her, hava havt yvirlivilsi sum útgangsstøði. Húsini lógu væl vard fyri veðri og vindi, og lættliga slapst til sjógvin eftir føði. Heidi heldur, at hesir hava dugað væl at laga seg eftir topografi og verðinshornum.

– Tá vit í 60´unum byrjaðu at byggja týpuhús í Føroyum, mistu vit meir ella minni sambandið við náttúru og verðinshorn. Øll hús vóru skorin yvir ein kamb, líkamikið um húsini lógu í Tjørnuvík ella á Toftum. Um familjan var ung við fimm børnum, ella um hetta var eitt eldri par gjørdi tað sama. Lívsvirðið var heldur ikki aktuelt tá. Men nú eru vit farin at gerast meira tilvitað um júst hetta við lívsvirðinum. Proportionalt við at arbeiðslívið verður meira krevjandi, veksur viljin um at betra lívsvirðið, og ráðini til hetta gerast eisini betri, greiðir Heidi frá.

Nú til dags hava øll so nógv at gera, og lítil tíð er at brúka heima við hús. Tí heldur Heidi, at tað er týdningarmikið, at ein býr gott, teir fáu tímarnar ein er heima.

– Vit hava ofta lyndi til at byggja húsini soleiðis, at vit verja okkum ímóti tí ringa veðrinum. Men tað er har tað er galið. Vit gloyma teir fáu sóldagarnar, og tí eigur tú at gera smá smørhol, har tú kanst útnytta teir sólglottarnar vit hava.

Um pakkaloysnir og parcellhús sigur Heidi, at tað er nú einaferð soleiðis, at so hvørt sum býir vaksa og byggiøkið minkar, so er neyðugt at byggja tættari.

- Tá er talan um at byggja raðhús, randarhús og størri íbúðarblokkar, og hetta kann skjótt gerast eitt monotont byggjarí. Vit hava tó dømir uppá, at góðar loysnir eru til, sum til dømis Berjabrekka og Tórsbyrgi. Í øllum førum er tað av alstórum týdningi, at tú tekur arkitektin við uppá ráð, tá tú slík bygging fer í gongd. Slíkar byggingar fylla nógv og eru sjónligar í okkara træfátæka og bera landslagi, og soleiðis verðue hetta "en torn i øjet", um loysnin er vánalig. Ringar royndir eru av einstáttaðum byggjaríi aðrastaðni í heiminum, og hesum eiga vit at læra av.

- Í Føroyum er møguleiki at búgva væl, og fáa aðrastaðni í heiminum er útsýnið frá vindeyganum so vakurt sum her heima.

– Okkara avbjóðing er tí at fáa sum mest burturúr hesi vøkru náttúruni, sigur Heidi, sum vísir á, at sóldagarnir vit hava, eiga at verða útnyttaðir til tað síðsta.

Prátið fellur so við og við burtur frá arkitekturi, og tosað verður um Italia, USA, lestrarmøguleikar og mangt annað. Men tinghúsið verður klárt at taka í nýtslu tann 15. mai, tá tingið verður sett. Til ta tíð bíða vit spent, hvat tingmanningin fer at siga til nýggju innrættingina.

## Stutt um Heidi

Heidi Poulsen er 38 ára gomul. Hon er uppvaksin á Strondum, har hon búði til hon var 17 ára gomul. Síðani fór hon eitt ár yvir til Ohio í Amerika við AFS, og tá hon kom aftur, byrjaði hon at ganga í skúla í Havn. Tá hon varð klakt sum nýmálsligur studentur, arbeiddi hon eitt ár hjá Katrinu Christiansen í Havn, og eitt síðani eitt ár sum vikarur á Strondum. Sjálv sigur Heidi, at tað var heilt tilvildarligt, at hon gjørdist arkitektur. Tá hon gekk í Hoydølum, var hon sannførd um, at lækni skuldi vera hennara lívsyrki. Men tá hon hitti Igga úr Vestmanna, vaks áhugin fyri arkitekturi, og sigur Heidi sjálv, at hon altíð hevur dámað væl at tekna. Tankin um at gerast sjúkrasystir er eisini komin fram. Men Heidi valdi at søkja inn til arkitekt, og í 1993 fekk hon prógv av Kunstakademiets Arkitektskole í Keypmannahavn.

Heidi flutti aftur til Føroya fyri einum ári síðani. Ætlanin var at flyta aftur til Danmarkar, tá tinghúsið var liðugt, men av tí, at sonur hennara trívist so væl í Føroyum, hevur hon gjørt av at verða verandi.

Umframt at vinna kappingina um nýggja tinghúsið, hevur hon eisini vunnið eina kapping um bygging av einum skúlamiðdepli í Marknagili.

Heidi sigur, at kappingar eru serliga spennandi.

– Tú ført brúkt arkitektayrkið á ein heilt annan hátt, har tú ført fabulerað nógv meira enn tá tú skalt tekna eina konkreta uppgávu.



# Øll hava brúk fyri einum herðaklappi við hvørt

- Fatanin fyri míni list er ikki stór í Føroyum. Tað eru gott og væl tjúgu ár síðani eg varð útbúgvin av Akademiinum, og eg havi málað øll árini síðani meir og minni. Tí haldi eg, at tað er rættiliga vánaligt, at Listasavnið ikki fyrr enn nú keypir málningar frá mær. Heldur ikki sleppi eg upp í part, tá ið Listafelagið skipar fyri framsýningum uttanlands. Tað líkist ongum, at tey sum fyri almennar pengar keypa og skipa fyri, seta seg sjálvi sum smaksdómara yvir allari list, sigur Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen, listakvinna á Eiði



*Í løtuni fyrireikar Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen seg til framsýningina, hon saman við sjey øðrum skal hava í Norðurlandahúsinum í summar. Framsýningin umboðar nútíðarlist í Føroyum, og fyrireikararnir miða eftir at fáa framsýningina uttanlands eisini.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

MENTAN OG MENNING

*Turið Kjølbro*

Seinastu nógvu árini hevur Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen á Eiði, sum hevur listaliga útbúgving av Kongliga Akademiinum í Keypmannahavn, burturav arbeitt við list. Í kjallaranum við útsýni Norður á Dal hevur hon atelier. Har standa hópin av málningum og á stafelinum, sum abbi hennara hevur átt, er málningur í gerð. Júst í løtuni fyrireikar hon seg til framsýningina, hon saman við sjey øðrum skal hava í Norðurlandahúsinum í summar. Framsýningin umboðar nútíðarlist í Føroyum, og fyrireikararnir miða eftir at fáa framsýningina uttanlands eisini.

Sum virkið listafólk og nevndarlimur í Myndlistafelagnum hevur hon við áhuga fylgt við í kjakinum, sum hevur verið síðani mentunarálitið Mentan og menning varð almannakunngjørt.

- Verða ætlanirnar, sum mentunarálitið leggur upp til, førdar út í lívið, verður tað heilt fantastiskt, eitt veruliga stórt framstig fyri øll listafólk. Nú hava myndugleikarnir í øllum førum eitt álit at arbeiða út frá.

Treyðugt so, so metir Sigrun G. Niclasen, at okkurt átti at verið øðrvísi í álitinum. Eitt nú dámar henni einki, at munur verður gjørdur á listagreinunum, tá ið pengar umræður. Sambært álitinum skulu myndlistaráðið og bókmentaráðið fáa væl minni pening at ráða yvir enn hini ráðini, sum sett verða á stovn.

- Listaráðini eiga at verða raðfest líka høgt. Stórt framstig er tað eisini um listafólk fáa betri atgongd til atelier, men sum skilst er ætlanin at samarbeiða við kommunurnar á hesum øki, sigur Sigrun G. Niclasen.

Hon vónar, at ein broyting kemur í hugburðinum hjá fólki, sum halda, at gevur listin ikki pengar, skal hon ikki stuðlast.

- Nógv listafólk gera stóra list, men sleppa ikki av við hana. Hetta hevur altíð verið luturin hjá listafólki. Skulu marknaðarkreftirnar gera av, hvør list skal stuðlast og ikki, fær eingin stuðul. Íslendingar stuðla væl sínum listafólki, meðan vit hugsa sum so, at listin einki skal kosta. Eg eri sannførd um, at geva føroyingar listini pengar, koma teir tvífalt aftur, men tað er trupult at sannføra fólk, at so er, tí tað er ikki so eyðsýnt. Spyr onkur meg, royni eg at greiða frá, at listarverk eru verd at stuðla av samfelagnum, men

*Framhald á síðu 6*

## Lív & List

Listafólk, umboðandi allar listagreinir, greiða frá sínum listaliga lívi og gera sær tankar um mentunarálitið, Mentan og Menning, og hvussu tey kunnu hugsað sær ein føroy-skan mentunarpolitikk.